# Brandur er stjørna á svenskari jólakonsert



Brandur endaði sína framførðslu á konsertini við persónliga yndlingssanginum "O helga natt"



**"Brandur Enni från Färöarna!" rópar Shirley Clamp, og tvørádrongurin kemur inn á stóra pallin við sínum gittara og syngur "Góða sig mær". Hetta er ein av mongum fantastiskum løtum í stórslignu jólakonsertini, sum Brandur Enni hevur verið partur av allan jólamánaðin. Sosialurin var við til endaspurtin og hitti Brand, ið meira enn nakrantíð er ávegis at vinna sær eitt pláss millum tær heilt stóru stjørnurnar í Svøríki**

Inna Törnroos

Konsertin í Stockholm er næstseinasta av 33 konsertum. Ferðin byrjaði 25. november í Gävle, og ferðast hevur verið gjøgnum alt Svøríki – á leiðini hava fleiri eykakonsertir verið á skránni.

- Vit hava havt onkran mánadag frí, annars hava vit havt eina ella tvær konsertir hvønn einasta dag, greiður Brandur frá.

Hetta er fyrsta rættiliga konsertferðini, hann hevur verið partur av, og hann lýsir ferðina sum lærurika og spennandi, og tað er hugaligt